# MÓTSETNINGA

**Flottastu yachtirnar og minstu dangurnar. Royndir rokskiparar og óvandir óvitar. Stórhvalatvøst og breyð við livurpostej. Hugnaligir harmonikutónar og pumpandi technorútmur. Árliga regatta'in av Eiði til Hósvíkar, savnar saman tað, eingin annar festivalur ella nøkur onnur stevna megnar**

Rólant Waag Dam

Teinurin er ikki langur. Smáir 20 kilometrar. Túrurin tekur heldur ikki langa tíð. Millum tríggjar og fýra tímar. Ikki tí, tað ber væl til at ferðast av Eiði til Hósvíkar skjótari enn so, men tað er ikki endamálið.

Faktiskt er tað í stríð við endamálið við regatta'ini!

## Hugnin

Á regatta'ini er høvuðsendamálið at hava tað hugnaligt. Øll, ung sum eldri, taka tað róligt – eingin hevur skund, eingin skal á fund og øll hava tað gott. Og tað er pláss fyri øllum. Øllum fólkum og øllum bátum.

Stjórar í stórum yachtum, ítróttarfólk í kappróðrarbátum, onkur kajakk og onkur vatnskutari plaga eisini at taka lut. Lítlar jollur við páhengsmotori og útróðrarbátar.

- Flýtur tað og hevur framdrift, er tað kvalifiserað til regatta, siga fyrireikararnir.

Eins ymiskir bátarnir eru, eins ymisk eru fólkini. Politikkarar, vinnulívsmenn, timburmenn, fólk við timburmonnum og fólk, sum ongantíð hava havt timburmenn. Har eru frisørar, pedogogar, sjúkraróktarfrøðingar, lærarar og fólk uttan lærdóm.

Øll so ymisk og tó so lík, tí hugnin er í hásæti og øll slappa av á sín hátt.

## Bátarnir

Eisini á teimum flottastu førunum er tað soleiðis, at tú sjálvandi ert vælkomin umborð – so leingi tú letur teg úr skónum og vaskar hendurnar. Tað er jú eingin grund til at dálka gólvið (jú, tað er nemliga eitt gólv og ikki eitt dúrk) og hvítu leðurmøblarnar.

Hetta eru bátar, sum hava baðiverilsi, køk og sovikømur við dupultsong. Tað er eisini í bátum sum hesum, at tú brúkar knív og gaffil meðan tú etur hvítleyksmarineraðan búff, drekkur reyðvín og fær cognac omaná.

Í øðrum bátum eru fólk í gummistivlum, drakt og vøttum. Alt annað hevði verið vitleyst. Umstøðurnar eru ikki til at seta seg niður, tí tað skal oysast meðan siglt verður. Av tí sama má matpakkin smyrjast heimanifrá, breyð við livurpostej pakkað inn í silvurpappír.

Sjálvur báturin, sum varð keyptur brúktur í síni tíð, hevur sæð betri dagar. Tað sama er galdandi fyri páhengsmotorin, ið kostaði meira enn tvífalt so nógv sum sjálvur báturin!

Men tað er tað eingin, sum hugsar um, tí hvat er tað ikki deiligt at báturin framvegis verður brúktur, og matur smakkar altíð best, tá tú etur undir opnum himni.

## Tónleikurin

Tónleikurin á regatta'ini er nakað fyri seg. Sjálvt ikki G!, sum í ár megnaði at diska upp við bæði jodlitónleiki í Kleine Heine og deyðsmálmi í Arch Enemy, spenna so víða tónlistarliga, sum tey gera á regatta'ini.

Í bátunum verður sungið og spælt. Harmonikur, munnharpur, gittarar og mangt annað verður brúkt. Eisini risastór anlegg og smáir ghettoblastarar, sum spæla alt frá Rammstein, Tiesto, 200, Páll Finnur Páll og MC Restorff, seta sín serliga dám á.

Soleiðis fara summir bátar – tónlistarliga – buldrandi suður gjøgnum Sundalagið, meðan aðrir bátar damla avstað við jammandi manning umborð.

Soleiðis verður eisini, tá lagt verður at í Hósvík. Onkur bátur ljóðar sum eitt heilt diskotek, úr øðrum ljóðar tað sum Dans på Brygga. Kanska er tað eisini ógvuliga hóskiligt, at tað er soleiðis, tí regatta'in er onkursvegna endin á summarinum. Tað er endin á øllum stevnunum og festivalunum.

Júst tí ger tað einki, at alt verður savnað saman í einum. Allir teir ymsu festival- og stevnugestirnir, ið umboða allan ymiskleikan, sum føroyingar fevna um, seta eitt felagspunktum fyri summarinum og summarveitslunum.

Alt umboðað í umleið 100 bátum og 1000 fólkum.

rolant@sosialurin.fo











